tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2018 |
| Fundardagur | 9. apríl 2018 kl. 17:00-18:40 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Roest, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen. Alvi Mortensen hevði forfall til fundin.

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar

| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Samanbering av skattatølum - mars mánaða 2018 | 2 |
| 2 | Nýggj breytaskipan í Tvøroyrar skúla - umsókn um fíggjarligan stuðul í tí sambandi | 2 |
| 3 | Stuðulsumsókn - Litbrá - um list í almenna rúminum á Tvøroyri | 4 |
| 4 | Støðutakan til leigusáttmála viðv. skrivstovuhøli hjá Sernám í Vági | 5 |
| 5 | Góðkenning av samstarvsavtalu við Gjaldstovuna um starvsfólkaløn arportal | 7 |
| 6 | Verkætlan um at byggja smáttur til ferðavinnuna í Suðuroy | 8 |
| 7 | Kunning um umhvørvisviku á Tvøroyri í viku 18 | 9 |
| 8 | Møgulig leiga av øki á Drelnesi - fyrispurningur frá Landsverki | 10 |
| 9 | Innlendis- og økismenning av ferðavinnuni - luttøka av øðrum kommunum | 11 |

tlf 371055
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2018 |
| Fundardagur | 9. apríl 2018 kl. 17:00-18:40 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.20.00-I00-1-18**

## 1. Samanbering av skattatølum - mars mánaða 2018

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar um skattatølini fyri mars mánaða og higartil í árinum sum heild.

**Fíggjarnevndin, 4. apríl 2018, pkt. 1:**
Fíggjarnevndin tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

Skjøl

- Samanbering av skatti mars 2018

**17.00.00-I00-1-18**

## 2. Nýggj breytaskipan í Tvøroyrar skúla - umsókn um fíggjarligan stuðul í tí sambandi

### Málsfrágreiðing

Tvøroyrar skúli við nýggjari breytaskipan til komandi skúlaár í framhaldsdeildini, har ein sjóvinnubreyt inngongur. Í hesum sambandi hevur skúlin samskift við fólkini handan træ-skipið Thorshavn fyri at kanna møguleikarnar fyri, at Thorshavn nakrar tímar um vikuna kann brúkast sum undirvísingarhøli í sambandi við sjóvinnubreytina. Málið hevur verið viðgjørt á fundum í mentanarnevndini í februar og mars mánaða. Í hesum sambandi hevur mentanarnevndin havt fund við umboð fyri Tvøroyrar skúla og Thorshavn, sí viðfestu skjøl í málinum.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2018 |
| Fundardagur | 9. apríl 2018 kl. 17:00-18:40 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Mentanarnevndin, 26. februar 2018, pkt. 1:**
Mentanarnevndin er sera jalig viðvíkjandi ætlanini, men ynskiligt er at frætta meira um hvussu skúlin ætlar at leggja undirvísingina til rættis. Ynskiligt er at lærarin, ið kemur at standa fyri undirvísingini, kemur at kunna mentanarnevndina meira um ætlanina. Semja er um at biðja um fund við viðkomandi persónar týsdagin 6. mars kl. 15:30.

**Mentanarnevndin, 26. marts 2018, pkt. 1:**
Mentanarnevndin samtykti, at gerast skal ein samstarvssáttmáli við grunnin Thorshavn, sum inniber, at Tvøroyrar kommuna veitir Thorshavn eina árliga játtan á kr. 30.000,- sum fatar um Thorshavn sum part av sjóvinnubreytini í Tvøroyrar skúla umframt at aðrir skúlaflokkar kunnu fara túrar við Thorshavn uttan eykakostnað, sí tilboð frá M/S Thorshavn til Tvøroyrar skúla, dagfest 27. januar 2018. Nevnda játtan hongur saman við, at Tvøroyrar kommuna í eitt 2-ára tíðarskeið hevur stuðla Thorshavn við kr. 60.500,-

Málið verður lagt fyri fíggjarnevndina og býráðið til endaliga støðutakan.

**Fíggjarnevndin, 4. apríl 2018, pkt. 3:**
Meirlutin í fíggjarnevndini Kristina Roest og Bjarni Hammer samtyktu, at taka undir við tilmælinum frá mentanarnevndini. Borgarstjórin tekur støðu á býráðsfundinum.

Fíggjarnevndin viðmerkti, at stuðulin til Thorshavn fer av játtanini hjá mentanarnevndini.

## Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá mentanarnevndini, og at tað verður gjørdur ein samstarvssáttmáli millum Tvøroyrar kommunu og Thorshavn, sum verður eftirmettur á várið 2019 áðrenn skúlaárið endar.

## Skjøl

- Teldubræv frá Finn Thomsen, skúlastjóra, við umsókn
- Tilboð.docx
- Umsókn breytaskipan Tvøroyrar kommuna.docx
- SV: Broytingar í 10.flokki - móttøkuváttan frá kommunustjóranum
- Re: Broytingar í 10.flokki - móttøkuváttan frá forkvinnuni í mentanarnevndini

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2018 |
| Fundardagur | 9. apríl 2018 kl. 17:00-18:40 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

- Grannskoðað ársfrásøgn 2017 - Thorshavn Grunnurin
- Fundarfrásøgn Breytarskipan í Tvøroyrar Skúla
- Kunning frá Súsonnu Bertholdsen

**20.04.03-100-1-18**

## 3. Stuðulsumsókn - Litbrá - um list í almenna rúminum á Tvøroyri

### Málsfrágreiðing

Sunniva G. Mortensen hevur við støði í samrøðu við Tvøroyrar kommunu á Jobmatch 2017, og fundi í býráðssalinum á Tvøroyri í januar mánaða 2018, gjørt eina verkætlanarlýsing, nevnd Litbrá, at prýða um fleiri gráar veggir við list í almenna rúminum á Tvøroyri. Sunniva er sjálv verkætlanarleiðari og hartil er uppskot gjørt um eina 5-mannaða listanevnd m/k, sum skal taka støðu til 6 listarverk. Ætlanin er, at verkætlanin skal fara av bakkastokki fyrstu ferð í sambandi við mentanarnáttina á Tvøroyri tann 6. juli 2018.

Sunniva søkir um fíggjarligan stuðul til hesa verkætlan. Fundur var aftur við Sunnivu umvegis skype tann 15. mars í ár, sí viðfestu verkætlanarlýsing, fundarfrágreiðing og skjøl í málinum annars.

**Mentanarnevndin, 26. marts 2018, pkt. 4:**
Mentanarnevndin samtykti, at mæla fíggjarnevndini og býráðnum til at stuðla verkætlanini Litbrá við kr. 40.000,-

**Fíggjarnevndin, 4. apríl 2018, pkt. 4:**
Meirlutin í fíggjarnevndini Kristina Roest og Bjarni Hammer tóku undir við tilmælinum frá mentanarnevndini. Borgarstjórin tekur støðu á býráðsfundinum.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá mentanarnevndini og stuðla verkætlanini Litbrá við kr. 40.000,- harav stuðlar kunningarstovan við kr. 15.000,-

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2018 |
| Fundardagur | 9. apríl 2018 kl. 17:00-18:40 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Skjøl

- Fundarfrásøgn - Litbrá
- SV: Skype-fundur við Sunnivu G. Mortensen
- Kunning frá tekniska leiðaranum
- Samskifti við Sunnivu G. Mortensen í.s.v. verkætlanarlýsingina
- Móttøkuváttan og fyribils svar til Sunnivu G. Mortensen
- Teldubræv við verkætlanarlýsing
- Verkætlanarlýsing Litbrá

**00.17.00-A00-4-16**

## 4. Støðutakan til leigusáttmála viðv. skrivstovuhøli hjá Sernám í Vági

### Málsfrágreiðing

Sambært samtykt hjá Tvøroyrar býráð tann 13. november 2017 varð fundur hildin við leiðsluna í Sernámi á Tvøroyri tann 5. mars í ár viðvíkjandi arbeiðs-viðurskiftunum hjá starvsfólkunum í Sernámi í Suðuroynni. Í hesum sambandi blivu viðurskiftini við atliti til hølini hjá Sernámi eisini umrødd, sí viðfesta notat frá fundinum og skjøl annars í málinum.

**Býráðið, 9. januar 2017, pkt. 3:**
Tvøroyrar Býráð samtykti einmælt, at býráðssamtyktin frá 31. desember 2016 stendur við.

**Býráðið, 13. februar 2017, pkt. 2:**
Býráðið samtykti einmælt, at býráðssamtyktirnar frá 31. desember 2016 og 9. januar 2017 standa við, sum tilmæla, at Sernám verður staðsett á Tvøroyri.

Býráðið viðmerkti einmælt, at tað hevur stóran týdning, at størvini innan virkisøki hjá Sernámi vera verandi í Suðuroynni og ikki flutt norður aftur til Tórshavn.

**Fíggjarnevndin, 13. november 2017, pkt. 4:**
Fíggjarnevndin samtykti, at mæla býráðnum til at bjóða Sernám v/Magnus Tausen, settum stjóra, á fund á Tvøroyri skjótast gjørligt, sum Magnus Tausen eisini viðmælir í skrivi til borgarstjóran, dagfest 24. oktober 2017.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2018 |
| Fundardagur | 9. apríl 2018 kl. 17:00-18:40 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Býráðið, 13. november 2017, pkt. 11:**
Býráðið samtykti einmælt, at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini, at bjóða setta stjóranum á Sernám, Magnus Tausen, á fund við býráðið skjótast gjørligt.

**Mentanarnevndin, 26. marts 2018, pkt. 5:**
Mentanarnevndin samtykti, at taka undir við sáttmálanum viðvíkjandi leigu av hølum til Sernám í Suðuroynni, staðsett í Vági. Málið til víðari viðgerð og endaliga støðutakan í fíggjarnevndini og býráðnum.

**Fíggjarnevndin, 4. apríl 2018, pkt. 5:**
Meirlutin Kristina Roest og Bjarni Hammer taka undir við tilmælinum frá mentanarnevndini. Borgarstjórin tekur støðu á býráðsfundinum.

## Avgerð

Meirlutin í býráðnum v/Anitu Vibergsdóttir, Bjarna Hammer, Boga Johannesen, Súsonnu Bertholdsen og Kristinu Roest, samtykti, at fylgja tilmælinum frá mentanarnevndini, at taka undir við sáttmálanum viðvíkjandi leigu av hølum til Sernám í Suðuroynni, staðsett í Vági.

Borgarstjórin atkvøddi ikki í málinum.

## Skjøl

- Uppskot til leigusáttmála Vágsvegur 61.pdf
- Teldubræv frá borgarstjóranum í Vági við kunning og fíggjarætlan
- Tvøroyrar kommuna.pdf
- Notat frá fundi við Sernám 5. mars 2018
- Kunning frá Margreth Olsen, stjóra í Sernámi
- Kunning um umskipan í Sernámi - Toymi 3.pdf
- Svar til stjóran í Sernám, Margreth Olsen, viðv. fundi
- Kunning frá borgarstjóranum í Sumba um samtykt
- Svar til býráðsskrivaran í Vági í.s.v. fyrispurning um leigusáttmála
- Samskifti við Magnus Tausen um fundar-tíðspunkt
- Bræv við innbjóðing til fund
- Notat frá fundi við Sernám 5. mars 2018, dagført 2. ferð 4. apríl 2018

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 60
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2018 |
| Fundardagur | 9. apríl 2018 kl. 17:00-18:40 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**81.10.00-A00-2-17**

## 5. Góðkenning av samstarvsavtalu við Gjaldstovuna um starvsfólkalønarportal

### Málsfrágreiðing

Gjaldstovan hevur ment eina nýggja starvsfólkalønarskipan, sum Tvøroyrar kommuna ynskir at verða ein partur av sum ein av fyrstu kommununum í Føroyum. Henda skipan vil gera umsitingina av lønar- og starvsfólkamálum meira gjøgnumskygda og úrslitagóða. Fundur við Gjaldstovuna í hesum sambandi varð hildin 28. juni 2017, men ikki fyrrenn nú er tað komið har til, at Gjaldstovan hevur gjørt eitt uppskot til eina samstarvsavtalu við Tvøroyrar kommunu, sí viðfestu skjøl.

Gjaldstovan upplýsir, at kostnaðurin fyri skipanina er ein eingangsupphædd á kr. 35.000,- sum verður goldin í ár og síðani ein árligur kostnaður á kr. 12.000,- galdandi frá 2019 at rokna. Fíggjarleiðarin og kommunustjórin mæla til, at góðkenna uppskot til samstarvsavtalu við teimum viðmerkingum, sum kommunustjórin nevnir og uppskot til fígging av skipanini.

Sambært samtykt hjá býráðnum 5. mars 2018, hevur umsitingin seinasta mánaðin verið í samskifti við Gjaldstovuna viðvíkjandi nøkrum nágreiningum í samstarvsavtaluni, serliga við atliti til kostnaðin av skipanini, sí viðfestu skjøl við samskifti í málinum.

**Býráðið, 5. marts 2018, pkt. 6:**
Býráðið tekur einmælt undir við at fara uppí starvsfólkalønarportalin saman við Gjaldstovuni, men ynskir at fáa útgreina møguligan meirkostnað av skipanini. Umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Fíggjarnevndin, 4. apríl 2018, pkt. 10:**
Fíggjarnevndin samtykti, at fara uppí starvsfólkalønarportalin saman við Gjaldstovuni. Málið til endaliga støðutakan í býráðnum.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini og fara uppí starvsfólkalønarportalin saman við Gjaldstovuni.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2018 |
| Fundardagur | 9. apríl 2018 kl. 17:00-18:40 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Skjøl**

- Til fíggjardeildina - uppskot til samstarvsavtalu við Gjaldstovuna viðvíkjandi starvsfólka-lønarportali til viðmerkingar.
- Atgongd til Starvsólkaportalin
- Svar frá Duritu Tausen, stjóra, í.s.v. áheitan frá kommunustjóranum
- Samskifti við Duritu Tausen í.s.v. ger av avtaluni
- Uppskot til avtalu við Gjaldstovuna, at leggja fyri býráðið 9. apríl
- Samskifti millum kommunustjóran og stjóran á Gjaldstovuni
- Teldubræv við viðmerkingum frá Tvøroyrar kommunu
- Svar frá Duritu Tausen í.s.v. fyrispurning viðv. samstarvssáttmálanum

**00.01.10-P00-1-17**

## 6. Verkætlan um at byggja smáttur til ferðavinnuna í Suðuroy

### Málsfrágreiðing

Í teldubrævi 9. mars 2018 biður borgarstjórin í Vági, Dennis Holm, kommununar í Suðuroynni taka støðu til, um kommununar vilja vera við í verkætlan, at byggja 50-100 smáttur rundt um í Suðuroynni í einum ferðavinnu-endamálið. Sambært Dennis Holm kann henda verkætlan viðføra eini 100-400 nýggj songjapláss í Suðuroynni, sí viðfestu skjøl við eini nærri kunning um verkætlanina.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at beina málið í nevnd, men ynskir at verða partur av yvirskipaðu verkætlanini um at menna Suðuroynna.

### Skjøl

- VS: MENNING Í SUÐUROY; BYGGJA SMÁTTUR TIL FERÐAVINNUNA
- Innbjóðing frá borgarstjóranum í Vági um fund
- VS: Frá fundinum 7. feb. 2018
- VS: Fundur um menning í Suðuroynni - ónsdagin 7. februar kl. 19

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2018 |
| Fundardagur | 9. apríl 2018 kl. 17:00-18:40 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**09.00.00-4-17**

## 7. Kunning um umhvørvisviku á Tvøroyri í viku 18

### Málsfrágreiðing

Við støði í býráðs-samtykt frá í fjør summar er umsitingin í samráði við teknisku nevnd og trivnaðar- og umhvørvisnevndina í holt við at fyrireika eina umhvørvisviku á Tvøroyri í viku 18, har ætlanin er, at henda umhvørvisvika skal verða afturvendandi sama tíðspunkt á hvørjum ári. Endamálið við umhvørvisvikuni er at savna ymiskar træðrir í mun til umhvørvis-spurningar í breiðum hópi, har Tvøroyrar kommuna samskipar tiltakið við Tvøroyrar skúla umframt ítróttar- og áhugafeløg í kommununi.

Við støði í umhvørvisvikuni og ikki minst stóra og týdningarmikla ruddingarátakinum í Trongisvágsbotni í fjør, er ætlanin, at fara í holt við at orða ein umhvørvispolitikk fyri Tvøroyrar kommunu.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevnd, 6. juni 2017, pkt. 2:**
Nevndin tekur undir við at kommunan skipar fyri árlig afturvendandi umhvørvisviku, helst samstundis sum Tvøroyrar Skúli.

**Fíggjarnevndin, 8. juni 2017, pkt. 6:**
Fíggjarnevndin mælir til, at fylgja tilmælinum frá trivnaðar- og umhvørvisnevndini, at kommunan skipar fyri einari árligari afturvendandi umhvørvisviku, helst samstundis sum Tvøroyrar Skúli og saman við ítróttar- og áhugafeløgum. Málið beint í Býráðið til endaliga støðutakan.

**Býráðið, 12. juni 2017, pkt. 4:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum hjá trivnaðar- og umhvørvisnevndini og fíggjarnevndini, at kommunan skipar fyri einari árligari afturvendandi umhvørvisviku, helst samstundis sum Tvøroyrar Skúli og saman við ítróttar- og áhugafeløgum. Peningur setast av á komandi fíggjarætlan til hesa umhvørvisviku.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina til eftirtektar, og ynskti at skráin fyri umhvørvisvikuna bleiv almannakunngjørd skjótast gjørligt í hesari vikuni.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 60
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2018 |
| Fundardagur | 9. apríl 2018 kl. 17:00-18:40 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Skjøl**

- VS: SV: Umhvørvisvika
- Fundarfrásøgn Ruddingardagur
- Re: Fundurin í annaðkvøld - kunning frá Bjarna Nygaard
- Fundurin í annaðkvøld - kunning frá trivnaðarfólkinum
- Kunning til trivnaðarfólkið um fyriskipan av umhvørvisviku
- Umhvørvisvika

**08.03.04-P20-1-18**

## 8. Møgulig leiga av øki á Drelnesi - fyrispurningur frá Landsverki

### Málsfrágreiðing

Landsverk hevur sent fram fyrispurning, um leigu av økinum á Drelnesi til upplagring av Þorkeris gróti. Fundur hevur í hesum sambandi verið á Tvøroyri við Landsverk.

**Fundur var á staðnum 7.3.2018** við umboðum frá LV og TvK. Til staðar vóru Heðin Poulsen (LV, deildarleiðari), Teddy Johannesen (formaður, Þorkeri, LV), Tummas Sørensen (TVK), Lasse Jensen (TVK) og undirritaði. Løgd var framm plantekning við uppskot til øki.
Vídd av øki sum bleiv diskutera num er uml. 4000 m2. Í telefonsamrøðu 23 marts 18 segði Heðin Poulsen, at LV hevur áhuga í nærri forhandling , og møguliga ynskja teir eitt sindur størri øki upptil 5.000 m2. HP ynskir nærri forhandlingar. Avtala er fund medio apríl.

Fyrispurningurin hevur verið viðgjørdur í vinnu- og havnanevndini og teknisku nevnd. Vinnu- og havnanevndin hevur á fundi 3. apríl 2018 frámælt, at leiga øki út til Landsverk til grótgoymslu.

Borgarstjórin ynskir fyrispurningin frá Landsverk til støðutakan í býráðnum.

**Vinnu- og havnanevnd, 27. februar 2018, pkt. 3:**
Nevndin tekur undur við at fundur verður hildin

**Tekniska deild mælir til, 3. apríl 2018, pkt. 4:**
Tilmæli: Taka upp forhandlingar við LV um øki og gerða uppskot til leigusáttmála.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2018 |
| Fundardagur | 9. apríl 2018 kl. 17:00-18:40 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Býráðið tók kunningina til eftirtektar. Borgarstjórin arbeiðir víðari við málinum.

### Skjøl

- RE: Tvøroyrar Kommuna - asfaltering og møgulig leiga av økinum á Drelnesi
- Fyrispurningur frá Landsverki til avgreiðan.
- Svar til Tummas Sørensen í.s.v. áheitan um at fáa málið fyri býráðið

**24.05.00-P20-1-17**

## 9. Innlendis- og økismenning av ferðavinnuni - luttøka av øðrum kommunum

### Málsfrágreiðing

Anita Vibergsdóttir biður um at fáa málið um innlendis- og økismenning av ferðavinnuni í Suðuroynni á skrá í sambandi við henda býráðsfund. Hetta tí, at verkætlanarleiðararnir Ingibjørg Berg og Theressa Turidardóttir Kreutzmann ynskja, at aðrar kommunur í Suðuroynni eru við í verkætlanini.

Borgarstjórin spurdi býráðið, sum ynskti hetta málið á skránna í dag og eingin var ímóti tí.

### Avgerð

Býráðið samtykti, at aðrar kommunur í Suðuroynni eru vælkomnar við í verkætlanina um at menna ferðavinnuna í Suðuroynna. Men arbeiðssetningurin og tíðarætlanin, sum er avtalaður við Tvøroyrar kommunu, skal haldast og aðrar kommunur skulu gjalda til verkætlanina eftir fólkatalinum.

Býráðið samtykti, at geva Ingibjørg Berg og Theresu Turidardóttir Kreutzmann heimild til at tosa við aðrar kommunur í Suðuroynni um at vera við í verkætlanini. Síðani venda Ingibjørg og Theresa aftur til Tvøroyrar kommunu við einum svari. Tvøroyrar kommuna fyriskipar skjótast gjørligt ein fund við Ingibjørg og Theresu hesum viðvíkjandi.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2018 |
| Fundardagur | 9. apríl 2018 kl. 17:00-18:40 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Skjøl**

- Fundarfrásøgn 27



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2018 |
| Fundardagur | 9. apríl 2018 kl. 17:00-18:40 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4/2018 |
| Fundardagur | 9. apríl 2018 kl. 17:00-18:40 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 18:40**

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Kristina Roest

Bjarni Hammer

Bogi Johannesen

Súsanna Bertholdsen